# Bara ein heimamaður er á íslendska liðnum

## Avgerandi dystir í dag og í morgin

Meðan landsliðið er í Slovenia, og tað nógva staðni kring Europa verða spæld ir avgerandi HM und ankappingardystir, stendur eisini nógv upp á spæl í heimliga fótbóltinum.

Í dag klokkan 14 fara 3. deildarliðið hjá Royn og 2. deildarliðið hjá KÍ at spæla seinna dystin um eitt pláss í 2. deild. hann verður spældur í Klaksvík. Sambært tíðindunum, sum komu frá FSF í síðstu viku, so skuldi Tummas Pauli Olsen vera 23. maðurin á vøllinum. Men hann er ikki tøkur, og tí verður tað Dagfinn Olsen, sum fer at halda skil á. Fyrri dysturin varð spældur í Hvalba síðsta leygardag, og hann endaði 1–1.

Í morgin klokkan 15 verður fyrri dysturin um eitt pláss í bestu deildini. Hann verður spældur á Sandi, har B71 fær vitjan av Skála. Petur Skarðenni verður dómari.

**jh**

**Íslendski landsliðsvenjarin roknar við størri undirtøku í Parkini, enn íslendingar nakrantíð áður hava havt á útivølli**

Tað eru nógvir avgerandi og harvið spennandi HM undankappingardystir á skránni kring Europa í dag. Sæð við norðurlendskum eygum er talan ivaleyst um tann mest spennandi, tá Danmark í kvøld fer at taka ímóti Íslandi.

Íslendingarnir hava staðið seg væl í undankappingini, men stórtapið í Belfast fyri einum mánað síðani var orsøk til, at teir ongan møguleika hava at spæla seg í fyrsta endaspælið nakrantíð.

Harafturímóti hava danir, sum síðani í EM endaspælinum í Fraklandi í 1984 hava verið regluligir luttakarar í EM og HM endaspølum, møguleikan. Um teir vinna í kvøld, so hava teir tryggjað sær rættin at spæla í Japan og Suðurkorea.

### Nógv er broytt

Í donsku pressuni hevur í hesi vikuni nógv verið gjørt burturúr dystinum í kvøld. Sum vanligt í sovornum førum so hevur eisini verið leitað aftur í søguna. Tá tað ræður um landsdystir ímillum Danmark og Ísland, so er skjótt at detta aftur á tiltikna dystin í Ítróttarparkini í 1967. Tað var ta ferðina, at Danmark vann 14–2, og at spælarar sum Finn Laudrup (pápi Michael og Brian), Tom Søndergaard, Kresten Bjerre og Ulrik le Fevré dusaðu sær frammanfyri áskoðarafjøldini, sum rópti, at tey vildu hava teirra lið at skora tjúgu mál!

Politiken hevur havt ein av ítróttartíðindamonnunum í Reykjavík, hagani hann mánadagin hevði samrøðu við mannin, sum fyri 34 árum síðani fjúrtan ferðir noyddist í meskarnar eftir bóltinum. Í dag er fyrrverandi KR málverjin tryggingarmaður í Reykjavík. Tá hann minnist aftur á dystin í Ítróttarparkini, so heldur hann ikki, at tað kundi setast niður á hann fyri eitt tað einasta av øllum málunum.

Hvørki danir ella íslendingar høvdu nakran fulltíðar yrkisspælara á landsliðnum í 1967. Eingir íslendingar vóru fulltíðar yrkisspælarar, og í Danmark vóru reglurnar soleiðis, at um ein spælari skrivaði sáttmála við eitt útlendskt felag – tá var einki professionelt felag í Danmark – so hevði hann avskrivað seg sjálvan av landsliðnum. Mótsatt í flestu øðrum londum, so vóru fulltíðar yrkisspælarar heilt fram til 1974 ein andstygd á danska fótbóltslandsliðnum.

### Bara Birkir úr ÍBV

Ísland hevur eitt gott landslið. Teir hava kortini ongantíð vunnið ímóti Danmark. Men íslendingarnir eru so mikið góðir, at Morten Olsen og hansara menn verða hjartans fegnir, um tað í kvøld eydnast teimum at vinna á Íslandi við einum máli.

At Ísland nú hevur eitt so gott landslið kemst ikki minst av, at heilt nógvir íslendskir fótbóltsspælarar vinna til dagsins uppihald – og ivaleyst meiri enn tað – í útlandinum. Hetta sæst væl aftur á íslendsku manningini, sum er í Keypmannahavn.

Av teimum átjan spælarunum, sum venjarin, Atli Edvaldsson (hann var liðformaður á íslendska landsliðnum, tá Føroyar 24. august í 1988 spældu fyrsta altjóða skrásetta landsdystin í Akranesi), fer í Parkina saman við í kvøld, er tað bara ein, sum spælir í íslendskum fótbólti.

Tað er gamli liðfelagin hjá Allani Mørkøre í vestmannaoyggjunum, ÍBV, Birkir Kristinsson. Hann er annar av málverjunum, og hann kappast við málverjan hjá Rosenborg, Arna Gautur Arason, um plássið millum stólparnar.

Seks av hinum spælarunum umboða feløg í bestu deildini í Noregi, fimm umboða eingilsk feløg, fýra koma úr Belgia, ein úr Týskalandi og ein úr Spania. Allir teir fýra íslendingarnir í Belgia, spæla við Lokeren, sum fyrr í summar sendi B68 úr Intertoto kappingini.

### Stuðulin

Allir stólarnir í Parkini verða upptiknir í kvøld. Og tað er eingin ivi um, at donsku áskoðararnir fegnir vilja hava, at talan verður um eina fagnaðarløtu fyri danska liðnum. Tað minnir ikki sørt um, tá føroyska liðið fyri tveimum árum síðani var í Prag, og tað var ein øgiligur rómur, tí Kekkia kvalifiseraði seg til EM endaspælið.

Danir vilja vera vitni til, at teirra lið vinnur og harvið kvalifiserar seg til endaspælið. Men teir vilja eisini fegnir síggja góða og glaða fótbóltsspælið, sum hevur verið vørkumerkið hjá liðnum, síðani Morten Olsen og Michael Laudrup fyrstu ferð høvdu ábyrgdina av liðnum (tað var á Tórsvølli 16. august í 2000, tá Danmark vann 2–0).

Hóast stóru donsku yvirvágina á áskoðaraplássunum, so roknar íslendski venjarin, Atli Edvaldson við, at hansara lið fer at hava størri undirtøku kring vøllin, enn teir nakrantíð áður hava havt á útivølli. Tað eydnaðist ikki, KSÍ, íslendska fótbóltssambandinum at selja øll atgongumerkini, sum teir fingu frá DBU, men kortini verður roknað við, at tað í minsta lagið verða tvey túsund íslendingar í Parkini.

Nógvir av frændum okkara fyri vestan búgva í Danmark og serliga í Keypmannahavn, har teir eru ella hava verið undir útbúgving. Tá íslendska fótbóltslandsliðið vitjar, er tjóðarskaparkenslan so stór, sum hon nevyan er undir øðrum umstøðum, og tí verða nógv íslendsk fløgg at síggja í Parkini í kvøld.

Tað verða eisini fleiri føroyingar í Parkini í kvøld. Hvørjum teir fara at taka á við, og hvørjum føroyingarnir frammanfyri sjónvarpstólini heima á landi fara at taka á við, er meiri ivasamt. Føroyingar unna altíð íslendingum alt tað besta, men tað er eisini ein royndur lutur, at nógvir føroyingar altíð hava havt og framvegis hava stóran áhuga fyri danska landsliðnum.

## Lassin í Wales

Í sambandi við stóra HM undankappingar umfarið, sum er á skránni hetta vikuskiftið, so verða eisini spæld ir nógvir U–21 landsdystir. Teir flestu av hesum dystunum vóru á skránni í gjárkvøldið.

Ein av dystunum er tann í Wales, har Hvítarussland vitjar. Dómarabólkurin, sum skuldi halda skil á fríggjakvøldið, er úr Føroyum. Lassin Isaksen var dómari, Jón Kári Frederiksen og Jens Albert Simonsen vóru hjálpardómarar, og Birgir Sondum var 4. dómari.

**jh**

# Djordjevic heldur fram í KÍ



**Klaksvíkingar ætla at dylja inntil á nýggjárinum, hvør verður venjari hjá teimum komandi ár**

KÍ HEIMASÍÐAN
*Jóannes Hansen*

KÍ hevur fingið eina nýggja og rættuliga snøgga heimasíðu á alnetinum. Har eru nógv viðkomandi at lesa um KÍ – bæði á føroyskum og á eingilskum: nevndir, venjarar, spælarar, hagtøl av ymsum slagi og tíðindastubbar.

Millum søgurnar, sum standa har, er tann, at jugoslaviski álopsmaðurin, Alexander Djordjevic, eisini komandi ár fer at spæla við KÍ. Sáttmáli um hetta varð undirskrivaður í vikuni. Ætlanin er, at Djordjevic umframt at spæla eisini skal vera venjari hjá onkrum av yngru liðunum.

Í farna kappingarárinum var Alexander Djordjevic við í seytjan landskappingardystum, og hann skoraði seks mál.

Ein onnur áhugaverd søga er eisini á nýggju heimasíðuni. Tað er ein søga, sum sigur, at tíðindini um hvør skal vera venjari hjá KÍ komandi ár, ikki verða almenn fyrrenn um ársskiftið. Men nevndin í felagnum bedýrar, at teir hava funnið venjaran, og at hann hevur verið í Klaksvík og hugt at umstøðunum.

Í Klaksvík eru tey farin at gita um, hvør venjarin er. Á listanum, sum leiðslan í felagnum stutt undan kappingarenda legði fyri teir, sum spræna pengar í felagið, stóðu Ion Geolgau, Kurt Mørkøre og Oddbjørn Joensen.

*Alexander Djordjevic*

Vikuskifti

Nr. 193 • leygardagur • 6. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



**Vælmalin farsa**

Oddfríður Marni Rasmussen ummælir leikin Fótur í hosu

Lesið á síðu 7

# Selt antikvitetir í fjórðingsøld



**- Tá eg fyri meira enn 25 árum síðani sá tríggjar nærum eins stovur uppá eina viku, helt eg, at okkurt skuldi gerast. Tí fór eg at selja antikvitetir, sigur nú 70 ára gamla Noomi Juul, ið býr í Havn**

Lesið á síðu 3

# Gud, pengar og halleluja



**Tað hendi nógv, tá donsk krossferð kom til Klaksvíkar seinasta vikuskiftið. Lívligu fundirnir í KÍ-høllini vóru drúgvir, men úrslit spurdist eisini burturúr - bæði andaliga og fíggjarliga**

Lesið á síðu 4-5